# Fundast um sjónvarpsrættindini í næstu viku

**Fótbóltssamband Føroya hevur kallað feløgini inn til fundar fríggjadagin í komandi viku at umrøða málið um sjónvarpsrættindini**

SJÓNVARPSRÆTTINDIR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Sum vit umrøddu her í blaðnum í farnu viku, so vildu feløgini í fremstu føroysku fótbóltsdeildini ikki skriva undir eitt skjal um sjónvarpsrættindir, sum tey høvdu fingið sendandi frá FSF.

### Gera fótbóltin meiri sjónligan

Skjalið, sum feløgini fingu sendandi, var um rættindini til at sjónvarpa dystir í føroysku 1. deild. Heitt var á feløgini um at lata sjónvarpsrættindini til Fótbóltssambandið, og tað kundu tey gera við at undirskriva skjalið.

Men hetta vildu feløgini ikki gera, tí tey mettu seg ikki hava fingið nóg mikið av kunning um, hvat tað merkti fyri feløgini, at tey lótu FSF sjónvarpsrættindini.

Nú hevur FSF so kallað inn til fundar í Havn fríggjadagin í komandi viku, har málið skal viðgerast av nýggjum.

Aðalskrivarin í Fótbóltssambandinum, Ísak Mikladal, sigur, at á fundinum verður málið gjøgnumgingið av nýggjum, og so fáa feløgini høvi til at seta teir spurningar, sum tey møguliga hava.

Spurdur um FSF longu er farið undir samráðingar við sjónvarpsveitarar um at senda frá føroyskum fótbólti, sigur Ísak Mikladal:

– Vit hava loddað dýpi hjá onkrum veitara, hvussu hetta kann gerast. Men tað mest umráðandi fyri okkum er at gera føroyskan fótbólt meiri sjónligan, fyrst og fremst her í Føroyum, sigur Ísak Mikladal.

# Bronsukandidatar vitja í Klaksvík

**Tríggir dystir eru á skránni í Sunset-kappingini hjá kvinnum um vikuskifti, og Stjørnan kann vænta sær harða mótstøðu, tá ið Søljan kemur á vitjan í Klaksvík**

SUNSET-KAPPINGIN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Stórur munur er á liðunum í Sunset-kappingini í hondbólti hjá kvinnum, og tað ger, at tað er meiri sjáldsamt millum teir tættu og spennandi dystirnar, har ilt er at meta um úrslitið frammanundan. Dystirnir, ið eru nú um vikuskiftið, tykjast rættuliga upplagdir, men oddaliðið Stjørnan kann tó vænta sær harða mótstøðu.

### Søljan stríðist fyri bronsuni

Aftur í ár eru tað Stjørnan úr Klaksvík og VB úr Vági, ið liggja og berjast um gullið. Hesi bæði lið hava verið tey sterkastu í føroyskum kvinnuhondbólti seinnu árini, og tey eru eitt vet betur enn hini liðini. Tað kemur valla fyri, at hesi bæði lið missa stig móti øðrum liðum, og tí verður kappingin um meistaraheitið so at siga hvørja ferð avgjørd í innanhýsis dystum millum júst hesi bæði lið.

Tað kann tó koma fyri, at okkurt av hinum liðunum ger ein vørr móti antin Stjørnuni og VB. Hetta sóu vit til dømis herfyri, tá ið Neistin var á odda 20-15 móti Stjørnuni góðar tíggju minuttir fyri leiklok, men við einum øgiligum endaspurt eydnaðist tað Stjørnuni at vinna 21-20.

Tey bæði lið, sum best eru før fyri at geva oddaliðunum báðum harða mótstøðu, eru júst Neistin og Søljan. Tá ið so havt verður í huga, at avrikini hjá Stjørnuni ikki hava verið serliga sannførandi í seinastuni, so er ikki óhugsandi, at Søljan kann geva klaksvíkskvinnum ein skarpan gang. Vágaliðið liggur eisini og berjist við Neistan um bronsuplássið, og hvørt stig er kærkomið í stríðnum um bronsuna.

### VB eisini á heimavølli

Eisini hitt oddaliðið, VB, er á heimavølli í vikuskiftinum. Vágskvinnur fáa vitjan av VÍF í Vági, og her er einki at ivast í, at tað er heimaliðið, sum er greiður favorittur at vinna dystin. VÍF er eitt miðallið í kappingini, og tær megna neyvan at gera nakað sum helst við VB á útivølli.

Avrikini hjá VB hava eisini verið rættuliga sannførandi í seinastuni, og har tykist ikki verða nakar slingur í valsinum í stríðnum um føroyameistaraheitið.

Seinasti dysturin í Sunset-kappingini um vikuskiftið verður í Havn sunnudagin, har Neistin fær vitjan av botnliðnum Tjaldur. Hetta verður samstundis fyrsta høvi hjá nýggja Neistavenjaranum, Inga Olsen, at standa á odda fyri liðnum, nú hann hevur loyst danan Flemming Raben av, og á júst hesin dysturin er neyvan tann truplasti hjá Inga at leggja til brots við.

# Sær lætt út hjá Mjølnir

**Kósin hjá Mjølnir móti FM-gullinum er sett, og ongar forðingar tykjast verða á vegnum**

MEISTARADEILDIN KVINNUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Alt bendir á, at tað fer at eydnast kvinnunum hjá Mjølnir at endurvinna føroyameistaraheitið og harvið vinna greipuna í kvinnuflogbólti í ár. Við sigrinum á Drátti á Giljanesi seinasta vikuskifti tók Mjølnir eitt risafet móti FM-heitinum, og á pappírinum síggja teir tríggir írestandi dystirnir ógvuliga lættir út hjá Mjølnir.

### Heima móti lægstu liðunum

Mjølnir hevur sum áðurnevnt tríggjar dystir eftir á skránni í ár. Teir eru móti trimum teimum niðastu liðunum í deildini, og allir tríggir eru teir í Klaksvík, so ikki kann sigast annað, enn at tað á pappírinum neyvan kundi verið lættari.

Tann fyrsti av hesum trimum dystum verður í dag, tá ið KÍF kemur á vitjan. Kollfjarðakvinnur hava havt eitt misjavnt ár í ár, og tað er einki, sum bendir á, at tær kunnu gera nakað sum helst við Mjølnir í Klaksvík.

Meiri spennandi tykist tað verða á Giljanesi, har Dráttur fær vitjan av TB. Hesi bæði lið eru nærmastu kappingarneytarnir hjá Mjølnir, og tað verður óivað millum hesi bæði lið, at silvurið og bronsan verða býtt. Tað hevur ligið væl fyri hjá Drátti í seinastuni, men spurningurin er, um ósigurin fyri Mjølnir farna vikuskifti hevur tikið eitt sindur av mótinum frá teimum aftur. Tá ið Dráttur og TB herfyri hittust í Trongisvági, vann Dráttur ein spennandi og javnan dyst.

TB hevur verið eitt sindur óstøðugt í seinastuni, og fleiri ferðir hava tær verið noyddar til at spæla fimm sett móti teimum lægstu liðunum, áðrenn tær hava fingið stigini til høldar.

Seinasti dysturin í meistaradeildini hjá kvinnum um vikuskiftið verður í Sørvági sunnudagin, har botnliðið SÍ fær vitjan av ÍF. Fuglfjarðakvinnur tykjast verða tað sterkasta liðið í niðara enda av stigatalvuni, og tær eru favorittar á vinna á avgjørda botnliðnum SÍ.

# Greiðir heimafavorittar

**Í báðum dystunum, sum verða leiktir í meistaradeildini hjá monnum um vikuskifti, er heimaliðið greiður favorittur at vinna dystin**

MEISTARADEILDIN MENN
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Nýklaktu føroyameistararnir úr SÍ fáa sunnudagin vitjan av ÍF í Sørvági, og um ikki sørvingar eru raktir av gull-timburmonnum, so er eingin ivi um, hvussu tann dysturin fer at ganga.

### Skulu halda fast í silvurinum

Sørvingar hava verið einaráðandi í mansflogbóltinum í ár, og tað sigur ikki so lítið, at teir longu farna vikuskiftið tryggjaðu sær meistaraheitið og harvið greipuna í ár.

Fuglfirðingar hava í nógv ár havt eitt sera sterkt lið, sum bæði hevur vunnið meistaraheitið og steypakappingina, men í ár er liðið nakað skert, og tí hevur ÍF ikki verið við heilt har frammi í meistaradeildini hjá monnum.

Tað menninir hjá Fram heldur ikki. Menninir hjá Fram skulu í dag royna seg á útivølli móti Mjølnir í Klaksvík, og tað er óivað ein trupul uppgáva hjá havnarliðnum. Mjølnir endurvann seinasta vikuskifti silvurplássið frá Fleyr, og tað ætla teir sær óivað at halda fast um við at vinna á Fram.

# Føroya uppgerð í Parkini

**Todi Jónsson, sum ikki slapp framat hóskvøldið fyrrenn tað restaði eitt korter, átti avgerandi leiklut í, at FCK í evstu løtu tryggjaði sær eitt stig móti Rosenborg**

ÚTISETAR
*Jóannes Hansen*

Fyri nøkrum árum síðani kom tað fleiri ferðir fyri í hvørjum kappingarári, at føroyskir útisetar brustu saman í bestu donsku deildini. Mótvegis nú so vóru tað fyri einum fimm árum síðani fleiri føroyingar í bestu deildini.

Nú er Todi Jónsson einsamallur føroyingur í superliguni, og tað er torført hjá honum at sleppa framat í superliguni. Tað varð enn eina ferð staðfest hóskvøldið, tá ið FCK í Parkini í fyrsta dystinum í millumumfarinum í Royalu liguni hevði vitjan av Rosenborg.

Álvaro Santos og Zuma vóru í FCK álopinum, og tá ið Zuma, sum ikki var serliga eyðsýndur, varð skiftur út, varð Jesper Bech sendur á vøllin. Álvaro Santos, sum javnaði við fínum einmansavriki til 1-1, var kosin dagsins maður í FCK. Todi Jónsson loysti hann av, tá ið tað restaði eitt korter, og Todi var við í útjavnandi málinum til 2-2.

Í síðstu sekundunum tamdi hann við høvdinum og eftir langa sending út til norska Magna Hoseth, sum av brotsteigarmarkinum heilfluktaði í málið. Í FCK fegnaðust teir um stigið, sum teir kendu seg í evstu løtu hava vunnið, men teir harmaðust samstundis um, at tvey stór mistøk í verjuni høvdu kostað tvey mál, og serliga ungverski málverjin, Balázs Rabóczki, stóð fyri skotum í donsku pressuni.

### Andrew á skránni

Seinnapartin í morgin er møguleiki fyri Føroya uppgerð í Parkini. Tá skulu Fremad Amager og FCK spæla fjórðingsfinalu í steypakappingini. Hesar seinastu dagarnar hevur nógv verið gjørt fyri at birta uppundir, at talan er um rættuliga "Københavner begivenhed". Eitt nú skipa feløgini bæði í dag fyri stórum tiltaki í nýggja søluhúsinum, Fields, á Amager.

Andrew av Fløtum er partur av 1. deildar liðnum Fremad Amager, og tað er ikki so lítið sannlíkt, at hann kann fáa møguleikan millum teir fyrstu ellivu í morgin.

Hvussu tað verður hjá Toda Jónsson í FCK álopinum er ein annar spurningur. Hann hevur leingi bíðað eftir at fáa ein orduligan møguleika. Enn hevur hann ikki fingið hann, og um hann ikki fær møguleikan millum teir fyrstu ellivu í morgin, so er ilt at ímynda sær, nær hann fer at fáa møguleikan, um ikki fleiri av hinum álopsspælarunum fella frá orsaka av skaðum ella leikbannum.